Vegleiðing:

# Soleiðis setur tú filtrið upp

Í hondini hevur tú eitt reytt filtur, sum skal brúkast til Televarpið. Filtrið skal hjálpa tær at síggja Televarpið framyvir, nú vit í seinastuni hava gjørt frekvensbroytingar. Tú setur filtrið upp á alt eftir, hvussu tín uppsetan sær út. Her eru nøkur dømi:

**A. Uppsetan við splittara**




**B. Uppsetan við forsterkara**




**C. Uppsetan við splittara og forsterkara**




Sama hvat dømi tú ert, skal filtrið setast millum kaðal frá antennu og forsterkara/splittara. Tað vil siga, at um tú ert uppsetan B, so skal filtrið setast upp á áðrenn forsterkaran.

**GG! Tað eru 5 møguleikar í mun til tína uppsetan, hvat tú skalt gera. Finn tína uppsetan á næstu síðunum.**

## 1. Antenna við forsterkara

Hevur tú eina antennu, har ein forsterkari situr á sjálvt antennuni, verður tú noyddur at skifta antennuna út. Set teg vinaliga í samband við okkum fyri at hoyra nærri. Tað er sannlíkt, at tú mást skifta antennu, um tín líkist einari av hesum:




## 2. Filtur setast upp á forskerkara

Situr kaðalin frá antennuni á forsterkaranum, skal filtrið setast millum antennu og forsterkara. Sí mynd:




## 3. Filtur setast upp á splittara – fleiri sjónvørp

Fer kaðalin frá antennuni beinleiðis í ein splittara, skal filtrið setast millum antennu og splittara. Sí mynd:




4. **Filtur setast upp á forsterkara og splittara – fleiri sjónvørp**
   Hevur tú bæði ein forsterkara og ein splittara, skal filtrið setast millum antennu og forsterkara. Sí mynd:




5. **Filtur setast upp á kaðal uttan nakað**
   Hevur tú bert ein kaðal, skal filtrið setast á kaðalin millum sjónvarpið og antennuna. Sí mynd:



## Tørvar tær hjálp?

Ring til okkara á tel. 340 340 gerandisdagar millum kl. 8-18 ella vitja heimasíðuna **tv.fo/800mhz**, um tú ert í iva ella tørvar hjálp. Á heimasíðuni **tv.fo/vegleidingar** eru smá filmsbrot um tað sama.

Vinaliga,

Televarpið